E - og tónleikurin

Rani Nolsøe, tónleikari og tónaskald

Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?
– Pápi mín spældi violin alt lívið og eitt sindur av banjo. Eisini var hann stórtrummusláari í Klaksvíkar Hornorkestri. Síðani innførdi Ingvør, eldra systur mín, fleirraddaðan sang og gittarina í familjuna, og har var Niels Christian, bróður, skjótur á sjóvarfallinum. Samstundis spældi beiggi mín Mouritz í Klaksvíkar Hornorkestri. So tónleikur var ein fastur táttur heima hjá okkum, og við tíðini dró hetta meg inn í fantastiska tónleikaheimin, sum altíð hevur sagt mær serliga nógv.

Spælir tú nakað ljóðføri?
— Eg byrjaði sum 12-13 ára gamalur sum bakking-tónleikari hjá Niels Christian bróður á trummum. Seinni var meiri brúk fyri bassinum, og so spældi eg tað. Men síðani eg var 15 ára gamal, yvirtók gittarin meg 100%, hóast eg heilt upp til 1977 spældi trummur við Ravmagn. Eisini kom eitt styttri klavertíðarskeið inn í myndina seinast í 70'unum. Tess vegna kann eg í dag spæla eitt sindur á klaver. Og tað er ikki so býtt, tí tað kann hjálpa at skifta ljóðføri av og á, tá eg geri nýggj løg.

Syngur tú undir brúsuni?
– Sjálvandi.

Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?
– Øll tannáringaárini droymdi eg meg ferð eftir ferð inn í tónleikaheimin og til øll míni idol.

Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?
– Tónleikur hevur nakað heilt serligt at siga fyri meg. Tónleikurin heldur einum parti av mær livandi, sum annars vildi følna. Einum parti í mínum lívi, har orð og medvit ikki hava so nógv at siga. Tað er helst har, eg so ella so eri í beinleiðis sambandi við lívið, náttúruna, mína per sónliga søgu, uttan at eg noyðist at brúka mína fornuft og pakka kenslurnar inn í trong orð.

Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?
- 200.

Hvat er tín yndisfløga?
- Av øllum fløgum er »Abbey Road« hjá The Beatles tann besta. Men seinasta árið hevur »All that you can't leave behind« hjá U2 sagt mær sera nógv.

Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar aftur-fyri?
– Eg veit ikki um tann fløgan finst
– møguliga onkur hjá Sussi og Leo.

Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?
— Eg veit ikki, um tann sangurin finst.

Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?
– Eg knýti ikki nakra plátu hjá mær saman við nakað pínligt.

Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?
– »How deep is your love« hjá Bee Gees ella »My way« hjá Frank Sinatra.

Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?
— Eg kundi svara, at besti tónleikurin byrjaði við Frank Sinatra og endaði via U2, Lloyd Webber, Straight Ahead, Beatles, Clickhase, Queen, Elton John, Billy Joel, Sting, Peter Gabriel, Deep Purple o.l. við nøkrum konstateringum hjá Hoola Bandoola Band.
Men tá alt kemur til alt haldi eg, at eg hevði koyrt Flaming Pie hjá Paul McCartney í fløguspælaran. Tann fløgan hevur eina serliga rúmd og erligheit, tí Paul júst tá hevði fingið konuna (Lindu) heimaftur av deyðiligari sjúkralegu og kendi seg inspireraðan at geva okkurt serligt víðari í tónleikinum. Tað bleiv til meistaraverkið Flaming Pie.

Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?
– Vælkomponeraðan spirituellan tónleik.

Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?
– Tónleikur sum fornoktar lívið.

Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?
– »Upp á gólv« hjá Straight Ahead, »Mamma Mia« hjá Abba, »Burning Love« hjá Elvis ella »Saturday night« hjá Elton John.

Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?
– »Hello Goodbye« hjá Beatles. Eg minnist mínar eldru systrar spældu sangin umaftur og umaftur, tá hann kom út mitt í 60'unum. Tann sangin dámdi mær sera væl, meðan mær slett ikki dámdi »Have you seen your Mother baby« hjá Rolling Stones, sum tær eisini spældu. Seinni er hetta lag sjálvandi blivið kult – eisini hjá mær.

Hvønn sang ert tú fegnast um at hava verið við til at gjørt ella spælt inn?
– »Friðarsangur« ella »Egvisjón« hjá Frændum.

Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?
– Hatta er ein trupul spurningur, og lívið er stutt (Demokrit).

Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?
– Millum Queen, Tracy Chapman, Jethro Tull, Deep Purple, Foreigner, John McLaughlin, Sebastian, Eivør Pálsdóttir í Klaksvík í 2000, Elton John tríggjar ferðir, Mikael Wiehe, Bjørn Afzelius, Billy Joel o.fl., hevur spanska gittarflogvitið Paco di Lucia í Falkoner Teatrinum higartil snýkt seg stevnin frammum hini.

Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?
– Millum teir livandi Bono ella Paul McCartney – millum teir deyðu John Lennon ella Mozart.

whazzzup!!!

Forrige | Næste | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast

TELDUBRÆVIÐ

Frá: Turid Mørkøre, turid.morkore@akvaforsk.nlh.no
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

Tantur, systrar, frøknir og onklar

Systrar at pápum ella mammum verða í Føroyum róptar fastrar ella mostrar. So greitt er tað ikki í Noregi. Her verða fastrar og mostrar róptar tantur, men tantur kunnu eisini vera kvinnur sum als ikki hava nøkur ættarbond. Tantu-fyribrigdið hevur eina heldur negativa løðing. Kvinnur, ið eru hvassorðaðar, vánaligir áhoyrarar, ráðarikar og ganga í gomlum ómótans klæðum, eru "tantete". Eitt dømi, sum passar væl til tantu-fyribrigdið, er Suffia-mostir í søguni um dólgarnar. Kvinnur, sum arbeiða í barnagørðum verða róptar tantur; barnehage-tanter. Hvussu tað enn skal tulkast.

Kvinnuligir lærarar eru ikki tantur. Tær verða róptar frøknin. Í dag er ikki loyvt at kalla ein kvinnuliga lærara fyri frøkin, alment, men tað verður gjørt allíkavæl. "Hevur tú fingið eina fitta frøkin," spyrja tey vaksnu ofta børn, tá tey byrja at ganga í skúla. Ein frøkin er harvið ein fitt dáma sum er góð við børn, og sum dámar at vera millum børn. Ein frøkin kann gott vera eitt sindur góðtrúgvin av náttúr. Mannligir lærarar verða róptir lærarar.

Fyrstu ferð eg var hjá lækna, helt eg, at læknin dreiv eina familjufyritøku, tá hann bað meg tosa við søster. Eg skilti seinni, at tað í Noregi er vanligt at kalla bæði sjúkrasystrar og nunnur fyri søster. Søster hevur eina positiva løðing, men í mun til frøknen, tvs. kvinnuligar lærarar, eru bæði tantu- og søster-fyribrigdið kynsleys.

Í Noregi verða pápa- og mammubeiggjar róptir onklar, men á sama hátt sum við tantum, kunnu onklar eisini vera menn uttan ættarbond. Í Noregi eru onklar eisini menn sum eru giftir við mostrum ella fastrum, ella bara góðir vinir av familjuni. Men onkelfyribrigdið hevur eina heilt aðra løðing enn tantu-fyribrigdið. Ein onkel er ein barngóður maður sum leiðbeinir børnum við eini fastari og vinarligari hond, og at verða kallaður onkel er sera positivt. Meðan kvinnur sum arbeiða í barnagørðum verða róptar tantur, so verða menn sum arbeiða í barnagørðum róptir onklar; barnehage-onkler. Í Noregi er eisini vanligt at kalla løgreglumenn fyri onkel-politi.

Sjálvt um løgreglumenn verða róptir onkel-politi, so verður onkel-fyribrigdið ikki brúkt um politikarar. Og tað fellur ikki náttúrligt fyri norðmenn at rópa amerikanska forsetan fyri onkel Bush.

UTTAN ÚR HEIMI

Hildið verður, at einir 40.000 amerikanskir hermenn eru í tí fremsta herliðinum, sum er á veg ímóti Bagdad

Mynd: Reuters

Sett kós ímóti Bagdad

Amerikanskar deildir nærkast skjótt irakska høvuðsstaðnum, men hildið verður, at mótstøðan verður hørð, tá deildirnar koma til sjálvan Bagdad

KRÍGGJ Í IRAK
Árni Joensen

Tær báðar amerikansku herdeildirnar, sum fóru um irakska markið og settu kós norðureftir, møttu lítlari og ongari mótstøðu, og í gjár var onnur deildin komin næstan 200 kilometrar norður frá markinum. Hermenninir møttu bert onkrum hissini irakskum mótálopi.

Tað var kortini greitt longu frammanundan, at Irak fór ikki at gera stórvegis mótstøðu her, tí irakska leiðslan hevur valt at savna sínar hermenn aðrastaðni. Herurin skal serliga verja høvuðsstaðin Bagdad, og tí vænta amerikanararnir sær munandi harðari mótstøðu, tá teir koma hagar.

Bretskir hermenn tóku seg í gjár ímóti týðandi oljubýnum Basra har suðuri í Írak. Har sóu teir eisini, at irakar høvdu sett eld á fleiri oljukeldur, eins og teir gjørdu í Flógvakrígnum fyri tólv árum síðani. Teir bretsku hermenninir fingu harðari mótstøðu har suðuri, enn amerikanararnir fingu har vesturi, og roknað varð eisini við, at irakski herurin ætlaði sær at verja Basra.

Irak hevur eisini týðandi oljuleiðir har norðuri í landinum, og í gjár ljóðaði, at amerikanskir hermenn høvdu tikið tær.

Saddam er kanska deyður

Amerikanarar eru sannførdir um, at Saddam Hussein var í einum av húsunum, sum amerikanarar bumbaðu hósnáttina

KRÍGGJ Í IRAK
Árni Joensen

Tað var fregnartænastan CIA, sum fekk George W. Bush, forseta at broyta ta upprunaligu álopsætlanina á Irak, og tí vórðu einar 40 rakettir skotnar eftir ávísum málum í Bagdad, samstundis sum flogfør tveittu nakrar laserstýrdar bumbur eftir málunum.

Spurningurin er so, um irakski leiðarin var í nøkrum av húsunum, sum vórðu rakt. Ónevndar keldur søgdu við Washington Post í gjár, at Saddam Hussein og í hvussu er ein av synum hansara vóru í einum av húsunum, sum vórðu rakt. Hesi húsini vóru sunnan fyri sjálvan Bagdad, og tey vórðu fullkomiliga løgd í oyði, tá Tomahawk-rakettir og laserstýrdar bumbur raktu tey.

Washington Post sigur seg hava fingið at vita frá einari keldu í Bush-umsitingini, at amerikanararnir hava varhugan av, at Saddam Hussein varð í hvussu er særdur, tí beint eftir álopið vórðu læknar sendir til bumbustaðið.

At irakska sjónvarpið tíðliga hósmorgunin sendi eina røðu hjá Saddam Hussein nýtist ikki at vera prógv fyri, at hann var á lívi. Upptøkan var hava verið gjørd undan álopinum, og ein annar møguleiki er, at tað var ein av teimum sonevndu dupultgangarunum hjá forsetanum, sum helt røðuna. Tað sigst, at Saddam Hussein hevur millum tríggjar og átta slíkar.

Eitt tekin um, at tað var ikki tann rætti Saddam Hussein, sum helt røðuna, sigst vera, at røðarin nýtti handrit, og at hann tóktist trilvandi. Víst verður á, at Saddam Hussein er altíð væl fyrireikaður, tá hann tosar í sjónvarpi, og at hann nýtir ikki handrit.

Amerikanarar viðganga kortini, at teir eru ikki vísir í sínari søk. Summir Saddam-kønir siga, at tað var tann veruligi Saddam Hussein, sum kom á sjónvarpsskíggjan hósmorgunin.

Er nú í Irak

Fyrrverandi irakski herovastin, Nizar Al-Khazrajis, sum fyri nøkrum døgum síðani hvarv úr húsavarðhaldi sínum í Danmark, er eftir øllum at døma komin til Irak.

Eitt blað í Saudiarabia visti fyri nøkrum døgum síðani at siga, at fyrrverandi herovastin var farin úr Danmark til Kuwait, og sama blað skrivaði í gjár, at herovastin nú er staddur í tí kurdiska økinum har norðuri í Irak. Í Danmark sat maðurin í húsavarðhaldi, tí kurdar skuldsettu hann fyri at hava staðið á odda fyri einari herdeild hjá Saddam Hussein, sum myrdi fleiri túsund kurdar við gassi.

Saudiarabiska blaðið skrivar, at ein donsk tænasta og amerikanska fregnartænastan CIA flutti fyrrverandi herovastan úr Danmark til Kuwait, haðani hann fór til Turkalands og síðani inn um irakska markið. Blaðið sigur seg hava upplýsingarnar frá andstøðukeldum í Irak.

Irak fer til ST

Irak hevur nú vent sær til ST og mótmælt álopinum á landið.

Í einum brævi til ST-aðalskrivaran, Kofi Annan, skrivar irakski ST-sendiharrin, Mohammed Aldouri, at ST eigur at vísa, at tað heldur upprunasáttmálan hjá felagsskapinum. Mohammed Aldouri skrivar, at álopið á Irak er eitt álopskríggj og brot á fólkarættin.

Samstundis hevur Kofi Annan fingið eitt bræv frá USA, Bretlandi og Avstralia, har tey trý londini greiða frá, at tey meta seg hava lógligan rætt til at leypa á Irak. Tað eru hermenn úr hesum trimum londunum, sum eru við í krígnum í Irak.

1.300 tikin

Í nógvum amerikanskum býum vóru mótmælisgongur hósdagin, eftir at kríggið í Irak var byrjað.

Undirtøkan var tó ikki stór allastaðni. Í Boston tóku umleið 4.000 fólk lut í mótmælunum, men í stórbýnum New York vóru bert nøkur hundrað fólk uppi í mótmælisgonguni. Løgreglan heldur kortini, at oysandi regn var ein orsøkin til, at áhugin var so lítil har. Stuðulin til kríggið er annars serliga stórur í New York.

Tær flestu mótmælisgongurnar vóru friðarligar, men í San Fransisco tók løgreglan 1.300 mótmælisfólk. Tey, sum skipaðu fyri mótmælinum í San Fransisco, søgdu aftaná, at høvdu mótmælisfólkini í øðrum býum nýtt somu framferð, hevði USA verið sett í undantaksstøðu.

Í øðrum býum gingu fólk stuðulsgongu fyri hermonnunum, sum eru í Irak. Í Dallas í Texas høvdu fólk fingið sær eitt gult band um annan armin. Hetta er gamal siður og er ein um, at allir hermenninir skulu koma heimaftur í øllum góðum.

Norðurkorea ávarar

Í fleiri ár hava almennar suðurkoreanskar útvarpsstøðir sent ymiskt propagandatilfar, sum hoyrist í Norðurkorea, men nú vil norðurkoreanska stjórnin hava enda á hesum sendingunum.

Herfyri gjørdi Suðurkorea av at steðga sendingunum, men í seinastuni hava tær verið aftur at hoyra, og tað hevur fingið ilt í norðurkoreanar. Stjórnin í Norðurkorea segði í gjár, at tað kann fáa álvarssamar avleiðingar, verða sendingarnar ikki steðgaðar.

Almenna norðurkoreanska tíðindastovan endurgav í gjár eit brævi, sum myndugleikarnir hava sent suðurkoreansku stjórnini. Í brævinum stóð, at steðgar stjórnin í Seoul ikki teimum oyðileggjandi sendingunum, fær tað álvarssamar avleiðingar.